TB-GÍ 3-0 (1-0):

# TB setti vongskerda GÍ upp á pláss

**Gøtumenn megnaðu einki at gera við tøttu TB verjuna, og tað hevði týdning fyri gongdina, at TB fekk fulla úrtøku, tá ið teir fyrstu ferð fingu møguleikan**

TB-GÍ
*Jóannes Hansen*



*TB hevur nú vunnið seg upp á fimta plássið á stigatalvuni*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Tað gongur strúkandi hjá TB. Í vikuni, sum fór ella neyvari 13. mai, fylti elsta bóltfelagið í landinum 113 ár. Tað feiraðu teir við man-ér. Mikukvøldið 11. mai tryggjaðu teir sær trý stig í Vági, og 2. hvítusunnudag 16. mai fingu teir aftur fulla úrtøku, tá ið botnliðið úr Gøtu var á Sevmýri.

Einki bendi fyrsta korterið á, at GÍ er botnlið. Teir høvdu fríska lotið undan, og teir løgdu væl fyri. Hvussu tað hevði havt hilnast, um Súni Olsen, sum aftur hesa ferð var framrættaður miðvallari aftanfyri Krzystof Popczynski, ið var einsamallur á toppinum, hevði havt lagt GÍ framum, tá ið hann gjørdist einsamallur á toppinum, ber tað bara til at ímynda sær. Men tað eydnaðist heldur ikki hesa ferð ársins spælara í fjør, sum ikki hevur havt somu eydnu við málskjótingini í ár, at fáa mál. Predrag Markovic staðfesti enn eina ferð, at hann er góður fongur hjá TB. Harvið bar tað framvegis TB til fyrst og fremst at dúva upp á verjupartin.

Tá ið fyrsta korterið var farið, linkaði GÍ trýstið eitt sindur, og tá ið TB fekk fulla úrtøku burturúr fyrsta málmøguleikanum, sum teir høvdu, var tað sum vátur vøttur frammaná hjá gøtumonnum, sum sjálvsagt vóru serliga móttakiligir fyri brotasjógvum, tí teir í teimum átta umførun-um frammanundan hava verið so illa tøssaðir.

Miðvallarin í høgru, Einar Petersen, legði frí-sparkssending í brotsteigin og eftir eitt sindur av afturi og fram var tað Óli Johannesen, sum smekkaði bóltin í málið aftanfyri Marcel Dawid, sum nú tykist skula fáa orduliga kapping frá Meinhardti Joensen, sum var á GÍ beinkinum.

TB dúvaði enn eina ferð upp á stinnu aftastu ketuna. Gøtumenn høvdu ógvuliga ilt við at bróta ígjøgnum. Á sentrala miðvøllinum hjá TB arbeiddu Bárður Dimon og Birgir Rasmussen væl, og í borðunum fingu teir góða hjálp frá Einari Petersen og Búa Mortensen.

Í framrættaða partinum var TB betri fyri hesa ferð, enn teir hava verið undanfarnu ferðirnar, tá ið tað hevur eydnast teimum at fáa úrtøku, hóast teir ikki hava havt nakað serligt av álopsspæli. At tað hilnaðist betri hesa ferð mundu tað vera tvær orsøkir til. Onnur er tann, at ungu og óroyndu spælararnir fáa alt størri sjálvsálit, nú tað er farið at ganga væl hjá TB. Hin orsøkin er tann, at mótstøðuliðið hesa ferð megnaði ikki at seta tað trýstið á tvøråmenn, sum onkur av hinum liðunum hava megnað at gera.

GÍ er langt frá gamlari styrki. Sámal Joensen er so mikið illa fyri, at tað ber honum ikki til at spæla. Magni Jarnskor varð nýttur seinna minna helmingin av seinna umfarinum, uttan at GÍ kom afturíaftur. Gøtumenn royna og royndu at stríðast, men teir vóru ikki nóg stinnir í framrættaða partinum, og í verjuni tóktust teir ikki serliga sannførandi.

Mótbrekkan hjá GÍ gjørdist uppaftur tyngri ímóti vindinum, tá ið seinna umfarið var sjey minuttir gamalt. Vongverjin í vinstru hjá TB, Jón Johannesen, legði fram til rættuliga væl upplagda álopsspælaran Olivur Abrahamsen, sum slapp frá GÍ verjuni og lyfti upp um Marcel Dawid og í kassan. Tá hevði Olivur frammanundan havt onkran góðan møguleika, og hann hevði fleiri enn henda eina, sum hann nýtti at økja um heimaleiðsluna til 2-0.

Í 89. minutti staðfesti innskifti Allan Poulsen stórsigurin, og harvið hevur TB vunnið tvær ferðir í hesum kappingarárinum 3-0 á heimavølli. Fyrra ferðin var, tá ið teir høvdu vitjan av EB/Streymi.

Hjá gøtumonnum veit illa við. Úrsitini eru soltin, og hóast lagið hevur verið og framvegis tykist vera gott, so kemst tað ikki úttanum, at sjálvsálitið minkar, og at mótbrekkan kennist serliga tung, tá ið tapið er so mikið dygt móti teimum, sum tað frammanundan kappingarbyrjan varð roknað við skuldu verða teir, ið fóru at hava størsta stríðið fyri at sleppa undan niðurflytingini.

Undan vitjanini í Vági hevur GÍ spælt tríggjar landskappingardystir á tamb, uttan at tað hevur eydnast at fáa mál! Tað er undirstriking av, at áður so høgt flúgvandi gøtumenninir av álvara eru skerdir - bæði í álopinum og í verjuni, sum í trimum teimum seinastu umførunum hevur latið seks mál fara ígjøgnum.

## FAKTA UM DYSTIN

**TB-GÍ 3-0 (1-0)**
1-0: Óli Johannesen 19.
2-0: Olivur Abrahamsen 52.
3-0: Allan Poulsen 89.
**Dómari:** Jens Petur Brattalíð
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Einar Petersen, Birgir Rasmussen, Bárður Dimon, Búi Mortensen (Allan Poulsen, 64.) - Emmanuel Larbi (Mortan Enni, 77.), Olivur Abrahamsen
**Gult kort:** eingin
**GÍ:** Marcel Dawid - Áslakur R. Petersen, Atli Gregersen, Robert Rzeczycki, Hanus Jacobsen - Sam Jacobsen, Símun Louis Jacobsen (Magni Jarnskor, 72.), Súni Olsen, Poul Henning Jacobsen (Poul Arni Jacobsen, 72.), Hans Pauli Petersen - Krzystof Popczynski
**Gult kort:** Áslakur R. Petersen

EB/Streymur-VB 1-1 (0-0):

# Við seinasta sparkinum

**Enn einaferð bjargaði sparkiteknikkurin hjá Hans Paula Samuelsen stig til EB/Streym. Hesa ferð tá hann í seinastu sekundunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Hóast heimaliði trýsti, so vóru vágbingar á ongan hátt sørir, tá teir leitaðu niðan eftir vøllinum*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Heldur ikki í fjórðu royndini eydnaðist EB/Streymi at vinna heimadyst. Møguleikarnir tóktust annars ikki heilt eingir, nú VB kom á vitjan, men hóast støðuna í tunga endanum, so hevur VB serliga á útivølli víst seg sum vandamikið kontra-lið, og tí vistu teir á felagsliðnum, at talan í øllum førum ikki skuldi verða um lætta uppgávu.

Nakað av vindi var eftir vøllinum, og fyri steðgin nýttu teir á heimaliðnum hendan til at leggja trýstið oman á VB-hálvuna. Fleiri ferðir var eisini nær við, at talan gjørdist um heilt góðar møguleikar, men antin var seinasta sendingin ikki nóg neyv, ella var talan um forkølaðar skotroyndir, sum Bjarni Johansen í VB-málinum ikki hevði nakrar trupulleikar av.

Eftir steðgin broyttist gongdin nakað. VB, sum eisini hevði havt nakrar kontra-møguleikar fyri steðgin, var nú í nógv størri mun við til at mynda spælið. Ikki minst, tá teir fleiri ferðir megnaðu at bróta uppspælið hjá EB/-Streymi, og tað var eisini hendan uppskriftin, sum varð nýtt, tá gestirnir løgdu seg á odda. EB/Streymur skuldi kontra, men teir mistu bóltin, og so gekk tað skjótt fyri seg. Spælt varð út í síðurnar og so innfyri, og har stóð Jón K. Poulsen púrasta leysur.

Seinastu løtuna royndi VB fyrst og fremst at halda fast um leiðsluna, og hetta eydnaðist eisini, til einir 92 minuttir vóru farnir. Tá fekk EB/Streymur fríspark á brotsteigarmarkinum. Sjálvir vildu teir á heimaliðnum vera við, at talan var um brotsspark, men fyri Hans Paula Samuelsen kundi hetta vera tað sama. Hann gav enn einaferð dømi um framúr sparkiteknikkin, og tó at Bjarni tveitti seg og fekk bóltin, so segði dómarin, at hesin hevði verið innanfyri.

1-1 við seinasta sparkinum í dystinum, og so kundu báðir partar fara til hús við einum stigi hvør. Eitt úrslit, sum bæði helst kunnu liva við, men har serliga vábingarnir mundu iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at halda fast í nøkur fá sekund afturat.

## FAKTA UM DYSTIN

**EB/Streymur-VB 1-1 (0-0)**
0-1 Jón Krosslá Poulsen, 65.
1-1 Hans Pauli Samuelsen, 90.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Bárður Olsen (Ólavur Poulsen, 77.), Andrzej Pacek, Fróði Clementsen, Gert Hansen – Hans Pauli Samuelsen, Marni Djurhuus, Knút Vesturtún, Jákup Martin Joensen (Hallur Jacobsen 65.) – Sonni L. Petersen (Teitur Joensen, 65.), Sorin Anghel
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Súni úr Hørg, Anders Sørensen, Kári í Lágabø – Poul N. Poulsen (Jón Krosslá Poulsen, 40.), Edvard Blé, Milan Kuljic, Símun Samuelsen – Mikael í Lágabø (Sigmund Mikkelsen, 88.), Dan Djurhuus